

www.oljan.fo

**Jan Müller** 21 - 05 - 2013

# Offshore-reglur samtyktar í ES

ES tingið hevur samtykt nýggjar trygdarreglur fyri olju- og gassvirksemi til havs. Hetta eru reglur, sum eitt nú hvørki Norra ella Bretland ganga inn fyri. Framstig Eg bjóði hesum stóra framstigi at styrkja trygdina í frálandavinnuni innan bæði olju- og gassframleiðslu í ES vælkomnum. Fyrrverandi óhapp hava víst, hvussu oyðileggjandi avleiðingar tað kann fáa, tá tað gongur galið offshore, sigur orkukommiserurin í ES, Günther Oettinger um samtyktina, sum varð gjørd í ES-tinginum í Strasbourg. Nýggju reglurnar mugu eisini góðkennast av teimum 27 limalondunum í ES, áðrenn tær koma í gildi. Norra ynskir ikki, at nýggja ES offshore-direktivið skal galda á norska landgrunninum. Stjórnin heldur, at verandi norsku reglurnar um trygd eru betri, og hevur givið ES boð um, at hon ikki metir nýggja regluverkið fyri at hava týdning í EØS høpi. Frá norskari síðu verður nú bíðað eftir, um ES fer at ganga ímóti norsku tulkingini. Norska umhvørvisfelagið Bellona hevur gjørt greitt, at tað metir direktivið vera av týdningi í EØS høpi og eigur tí at galda fyri Norra eisini. ES fór undir arbeiðið at gera egið offshore regluverk sum ein avleiðing av herviligu vanlukkuni í Meksikanska flógvanum fyri trimum árum síðani skrivar E24.no. Nýggju reglurnar merkja, at olju- og gassfeløg mugu vera før fyri at leggja fram tilbúgvingarætlanir, áðrenn tey fáa loyvi at bora ella framleiða. Tey mugu eisini kunna prógva, at tey kunnu rinda fyri sína fíggjarligu ábyrgd.